## Bilur við skaða til sølu

Fyri P/F Trygd selja vit ein Skoda Octavia Stationcar 1,9 Diesel, árg. 16/09-1999.

Bilurin hevur koyrt 32.000 km og verður seldur fyri hægsta boð sum hann stendur.



REYNI-SERVICE

tlf. 313040 · lokal 20-27

Götu Kommuna



## Pedagogur

søkist til Dagstovnin í Gøtu, at arbeiða 30 t. um vikuna, frá 12.03.01 til 01.05.02, fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi.

Arbeiðið er í barnagarðsstovu, 4–6 børn við 21 plássum.

Starvið verður lønt sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Lønarflokkur 11/13 lønarstig (16-22).

Um eingin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett.

Nærri upplýsing um starvið fæst við at venda sær til leiðaran, tlf. 442012 lok. 10.

Skrivlig umsókn við avritum av prógvum, viðmælum v.m. skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 26. febr. 2001.

**Dagstovnurin í Gøtu**
Box 32
511 Gøtugjógv

## Kunngerð

Sambært grein 13 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2001 um kommunustýri, skal við hesum verða gjørt kunnugt, at regluligu almennu býráðsfundirnir hjá Fuglafjarðar býráð í 2001 verða hildnir hesar týsdagar kl. 17.30 í býráðssalinum:

1. 06. februar
2. 06. mars
3. 03. apríl
4. 08. mai
5. 19. juni
6. 28. august
7. 25. september
8. 23. oktober
9. 20. november
10. 11. desember

*Fuglafjørður, tann 07. februar 2001*

**Fuglafjarðar býráð**

FØROYA FISKIMANNAFELAG

## Fiskimannafelagið og FF-blaðið fingið heimasíðu

Á okkara heimasíðu verður roynt at geva fiskimonnum alla ta kunning teir kunnu hava brúk fyri. Heimasíðan er tó enn undir uppbygging.

Allar høvuðsgreinirnar í FF-blaðnum eru hesa ferð eisini lagdar á heimasíðuna, tó uttan myndir. FF-blaðið roynir at vera eitt øðrvísi blað, sum ger sær ómak at undirbyggja síni sjónarmið og tíðindi.

Innihaldið í blaðnum 8. februar er í høvuðsheitum:
**Felagstíðindini:** Spurt verður hví politisku myndugleikarnir tykjast at gera sær ómak at koma til ilnar við flest møgulig fakfeløg.
**Fiskivinnutíðindi:** M.a. er frágreiðing frá ráðstevnu í Noreg um møguleikarnar at fáa meira burtur úr fiskaslógvi og øðrum útkasti.
**Samfelagsviðurskifti:** Hví ber ikki til eftir trimum árum at greiða eina lutfalsliga einfalda uppgávu sum at fáa eina nýggja lóg um seming?
**»Orðaskifti« um okkara fjølmiðlar:** Peter Mandelson, sum fyri kortum mátti leggja frá sær sum bretskur ráðharri, hevði ongar trupulleikar havt í Føroyum!
**Frásøgn frá persónum, kendum og ókendum:** FF-blaðið hevur vitjað Páll Vang, fyrrverandi borgmeistara á Tvøroyri, sum knappliga fyri einum ári síðani mátti leggja frá sær vegna sjúku. Eisini hevur blaðið vitjað ókendar føroyavinir í Kalundborg.

Møguleiki er eisini at tekna seg sum haldara av FF-blaðnum á heimasíðuni, sum kann røkkast á: www.fiskimannafelag.fo

**Føroya Fiskimannafelag • FF-blaðið**

## Pedagogur/ hjálparfólk

### til frítíðaransingina í Runavíkar kommunu

Søkt verður eftir pedagogi/hjálparfólki at arbeiða 20 tímar um vikuna í frítíðaransingini í Runavíkar Kommunu.
Frítíðaransingin, sum er skipað undir Kommunalu Barnaansingini, er normerað til 30 børn.

Vit ynskja at tú ert kreativ/ur, hevur góð samstarvsevnir og hevur hug at arbeiða við børnum.

Nærri upplýsingar starvinum viðvíkjandi fáast frá leiðaranum á tlf. 448594.

Skrivlig umsókn skal vera Kommunalu Barnaansingini í hendi í seinasta lagi 26/02-2001.



**Kommunala Barnaansingin**
Heiðavegur
600 Saltangará

## Kvøldskeið í føroyskari rættskriving

**6.–22. mars 2001 (tvey kvøld um vikuna, týsdag og hósdag) kl. 19.00–22.00**

**Luttakarar:**
Skeiðið er fyri fólki, sum vilja hava eina gjøgnumgongd av føroyskari mállæru, rættskriving, málburði og nýggjum yrkismáli.

**Skeiðleiðari:**
Ása Magnussen, Tekniski Skúlin í Tórshavn.

**Skeiðkostnaður:**
kr. 1.950,- (skal gjaldast við tilmelding)

**Stað:**
1. fyrsta hædd í el-deildini, Smiðjugerði

**Tilmelding:**
áðrenn 27. februar 2001

**Handverkarar kunnu søkja stuðul eftir reglugerð um eftirútbúgving av yrkislærdum.**

**Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin »VITAN«, kunnu søkja um stuðul haðani.**

Umsóknarbløð til Undirvísingar- og Mentamálastýrið og Vitan fáast á skúlanum.

Boðað verður frá luttøku við at venda sær til skúlan á tlf 311957
(mánadag - fríggjadag, kl. 8-12 & 13-16)

**TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN**
Marknagilsvegur 75, P.O.B. 239,
FO-110 Tórshavn, tlf. 311957, fax 316621
Teldupostur: mb@tst.fo

## Norðoya Røktarheim

**700 Klaksvík**

Søkt verður eftir summarfrítíðaravloysarum til Norðoya Røktarheim, frá 15. mai til 30. sept. 2001.
Søkt verður eftir avloysarum fyri sjúkrasystir, sjúkrahjálparum og almanna- og heilsuatstøðarum.

Heimið hevur 2 deildir við 18 búplássum á hvørjari deild. Arbeitt verður í skiftandi vaktum.

Lønar- og setunartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsókn saman við avriti av prógvi og autorisatión verður at senda til leiðaran fyri Norðoya Røktarheim, FO-700 Klaksvík.

Umsóknarfreist 2. apríl 2001.



## Studningar til landbúnaðin

***Allur studningur til landbúnaðin er treytaður av, at móttakarin hevur landbúnað sum vinnu, og harav er bókhaldsskyldigur og MVG-skrásettur.***
***Út frá hesum verður studningur bert latin umsøkjarum, sum hava latið skrivstovu jarðarráðsins MVG-skrásetingarskjal sítt fyri inniverandi ár og góðkendan roknskap fyri árið frammanundan.***
***Umsóknarfreistirnar skulu haldast. Árstíðarásettar freistir verða lýstar í bløðunum.***
***Annars er mannagongdin viðv. teimum ymisku studningunum lýst niðanfyri.***

**NEYTAKJØT**:
Umsóknarfreistin er ein mánaða, frá tí at neytið er dripið. Tá allir umbidnir upplýsingar fyriliggja, verður studningurin avgreiddur so hvørt.

**STRÁFÓÐUR:**
Søkjast skal skrivliga sambært lýsing í bløðunum. Stráfóðurstudningur verður avgreiddur einaferð árliga fyri alt landið í senni.

**SÚRHOYSBRUNNAR:**
Søkjast kann alt árið. Umsókn skal sendast, tá ætlan fyriliggur, og áðrenn arbeiðið byrjar. Studningurin verður avgreiddur, tá brunnurin er liðugur, sýnaður og góðkendur.

**RÆTTIR:**
Søkjast kann alt árið. Umsókn skal sendast tá ætlan fyriliggur, og áðrenn arbeiðið byrjar. Studningurin verður avgreiddur, tá arbeiðið er liðugt og góðkent. Studningurin verður bert latin til rættir við vaskibrunni.

**VELTING:**
Ætlanirnar skulu fráboðast við eini umsókn áðrenn 1. mai, og verða góðkendar fyri at studningur kann verða settur av til fráboðaðu arbeiðini. Veltað lendið skal vera sýnað og góðkent, áðrenn studningur verður avgreiddur. Verður arbeiðið ikki liðugt, er neyðugt at søkja umaftur árið eftir. Veltistudningur verður avgreiddur einaferð árliga fyri alt landið í senn.

**KØSTAR:**
Søkjast kann alt árið tá ætlan fyriliggur. Studningurin verður avgreiddur so hvørt arbeiðið er liðugt og góðkent.

**SEYÐAKJØT:**
Hesin studningur er afturbering av goldnum meirvirðisgjaldi. Umsóknin skal sendast jarðarráðnum samstundis sum meirvirðisgjaldið verður goldið T & S fyri farna ársfjórðingin, soleiðis at hon er okkum í hendi 20. í sama mánaði. Sostatt er seinasta freist:

okt.ársfj. 20. febr.
jan.ársfj. 20. mai
apr.ársfj. 20. aug.
juli ársfj. 20. nov.

Við umsóknini skal uppgerð og kvittan fylgja við. Studningurin verður avgreiddur so hvørt.

**MJÓLK:**
Henda studning avgreiðir jarðarráðið sambært uppgerð til MBM, sum lutar studningin út eftir innvigaðu mjólkarmongdini til virkið.

***Umsóknir um studning skulu altíð vera skrivaðar á umsóknarbløð, sum fáast á skrivstovu jarðarráðsins tlf. 311180. Á hesum umsóknarbløðunum eru prentaðar studningstreytirnar.***
***Umsóknir, ið eru skrivaðar á eldri umsóknarbløð, sum ikki eru galdandi longur ella á ljóstak av umsóknarbløðunum, verða ikki góðkendar.***
***Upplýsingar um studningsupphæddir o.a. fáast við at ringja tlf. 311180.***

FØROYA JARÐARRÁÐ

Postrúm 50 · R. C. Effersøesgøta 4 · 110 Tórshavn · tlf. 311180 · fax 311185 · teldupostur: fj@fj.fo
Telefontíð mánadag-hósdag 08.00-16.00 tó fríggjadag 08.00-15.30


KIA CARNIVAL

2.9 Dohc Turbo-Diesel16 V, 126 HK, 5 hurðar



Rætti bilurin til mong endamál.
Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri.

D. B. Bilar
Tel. 310 600





NORÐOYA SPARIKASSI

## Ársaðalfundur

Ársaðalfundur Norðoya Sparikassa verður:

**Fríggjadagin 23. mars 2001 kl. 15:00**

á Klaksvíkar Sjómansheimi við hesi dagskrá:

1. Val av fundarstjóra
2. Frágreiðing umsjónarráðsins um virki sparikassans í farna ári.
3. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar.
4. Val av limum í umsjónarráðið
5. Val av grannskoðarum.
6. Uppskot frá stjórn, umsjónarráði ella umboðsráðslimum.
7. Ymiskt

Umsjónarráðið

Ósávegur 1 Postboks 149 FO-700 Klaksvík
Tel: 475000 Fax: 476000 Teldupostur: ns@ns.fo www.ns.fo


## Norðfashion og Bamsan



Vit hava lagt deildirnar saman og eru flutt yvir í Norðfashion, Niels Finsensgøta 20.
Øll eru vælkomin at hyggja inn á gólvið.

*Vit hava klæði til alla familjuna*

**Norðfasion og Bamsan**
N. Finsensgøta 20 • 100 Tórshavn
Tlf. 32 25 50